Landsst‡ri › meirilutan ímóti sær



Birgir Danielsen, fyrr. løgtingsma›ur fyri Fólkaflokkin: A›rir flokkar mugu í samgonguna

SAMGONGA OG VAL
Jan Müller

– Eg haldi vit skulu ganga inn fyri fólkarættinum, og ta› sn‡r seg væl um, at ta› er Føroya fólk, sum skal bestemma. Ta› er eingin annar enn tann føroyski veljarin, sum skal avgera, hvat skal henda í vi›urskiftunum vi› Danmark. Ta› haldi eg eisini skal takast bókstaviligt. Ta› eru føroyingar, sum skulu rá›a, og ta› merkir væl, at ein stórur partur av føroysku flokkunum mugu til at st‡ra landinum, ta› veri› seg Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Javna›arflokkurin. Eg veit ikki, um Tjó›veldisflokkurin hevur naka› at gera har longur. Ta› modelli›, sum koyrt ver›ur eftir í løtuni, har landsst‡ri› heldur seg hava meiriluta aftanfyri seg, heldur ikki.

Hetta sigur Birgir Danielsen, fyrrverandi løgtingsma›ur fyri Fólka-flokkin og ein av okkara mest framstandandi vinnulívsmonnum.

Birgir Danielsen heldur, at ta› er ein stór helvt løgtinginum, sum ikki er samd vi› linjuni hjá lei›sluni í landsst‡rinum. -Og um hon nú ætlar sær at trumfa okkurt ígjøgnum, so kunnu vit bert ímynda okkum, hvat hendir eftir eitt komandi val. Hvat nú um Javna›armenn og Sambandsmenn vinna vali› spyr hann og yppir øksl.

Vi› sínum stóra áhuga fyri politikki og samfelagsvi›urskiftum stendur hesin fyrrv. fólkaflokspolitikarin heilt spyrjandi yvirfyri leiklutinum hjá sínum egna løgmanni og floksformanni í øllum fullveldismálinum. - Eg havi eisini ein varhuga av, at løgma›ur veit ikki, hvat vit skulu atkvø›a um til eina fólkaatkvø›u, og sjálvur ivist eg stórliga í, um hann hevur nakran møguleika at fáa ta brei›u undirtøkuna, sum hann hevur tosa› so nógv um, fær hann ikki stóru andstø›uflokk ella -flokkar vi›. Skal hann gera sær vónir um eina brei›a undirtøku, so má hann fáa ein ella fleiri av hinum stóru flokkunum vi› eisini.

Mugu hava stóran meiriluta

– Men fólki› hevur jú valt løgtingi›, og samgongan hevur parlamentariskan meiriluta aftanfyri seg!

– Eg loyvi mær at ivast í, um samgongan í roynd og veru hevur meiriluta aftan fyri seg. Vit vita, at helvtin av Fólkaflokkinum tekur ikki undir vi› linjuni hjá landsst‡rinum. Skulu vit í Føroyum fremja nakrar broytingar í vi›urskiftunum vi› Danmark og sum ein stórur meiriluti skal taka undir vi›, og har hugsi eg eini 70-80%, so má ta› gerast vi› í hvussu er einum stórum flokki aftrat. Hetta kann ikki endurtakast ov oftani.

Birgir Danielsen, sum eitt skifti sjálvur sat á løgtingi, og sum framvegis metir seg virkan lim í Fólkaflokkinum, er komin til ta sannføring, eftir at henda samgongan hevur siti› í skjótt tr‡ ár, at ta› dugir ikki at fremja broytingarnar í ríkisrættarligu vi›urskiftunum saman vi› Tjó›veldisflokkinum. – Skal naka› henda á hesum øki síggi eg bert ein útveg, og ta› er at broyta samgonguna.

Hann vísir á, at Fólkaflokkurin klárar seg sera illa í veljarakanningunum, me›an Anfinn Kallsberg klárar seg væl. – Eg skilji ikki, hví Fólkaflokkurin ikki útnyttar hesa stø›una og gevur Tjó›veldisflokkinum durafjór›ingin og sí›ani skipar eina n‡ggja samgongu saman vi› Javna›arflokkinum og Sambandsflokkinum.

Sambandi› broytt til ta› betra

Nú ta› neyvan er hugsandi, at allur Fólkaflokkurin so fegin fer í samgongu saman vi› Sambandsflokkinum, so heldur Birgir Danielsen ta› kortini vera rættiliga áhugavert at eyglei›a, hvussu Sambandsflokkurin er broyttur.

– Væl kann ta› vera, at Sambandsflokkurin hevur ein lei›slutrupulleika í dag, men flokkurin hevur kortini gjøgnum tí›ina veri› tann flokkur, sum hevur broytt seg mest. Eingin flokkur hevur broytt seg so nógv til ta› betra sum Sambandsflokkurin, hóast alt. Teir flagga vi› føroyskum flaggi, teir tosa føroyskt mál og vildu ongantí› droymt um at tosa naka› anna›. Og lesur man, hvat teir hava sagt um alt hetta fyri 100 árum sí›ani, so er nógv broytt. Eg vildi tí veri› minst bangin fyri at fara í holt vi› Sambandsflokkin, tá hugsa› ver›ur um at skipa n‡tt landsst‡ri.

– Men hvat hevur Tjó›veldisflokkurin broytt seg tey 50 ár hann hevur veri› til spyr Birgir Danielsen og svarar avgjørdur: -Ómetaliga líti› ella einki.

Polarisering

Birgir Danielsen ber ótta fyri, at vit fáa eina polarisering í føroyskum politikki, um ikki Fólkaflokkurin tekur bæ›i Javna›arflokkin og Sambandsflokkin til sín. -Og er ta› naka›, sum vit ikki hava brúk fyri í føroyskum politikki í løtuni, so er ta› eini øktari polarisering. Hvat skulu vit brúka hana til? Hon fer bara at gera ta› politiska arbei›i› enn torførari leggur hann aftrat.

Vit spurdu Birgir Danielsen, hvat hansara bo› er uppá sjálvst‡ristilgongdina, nú fleiri meta, at modelli› hjá Anfinn og Høgna hevur spælt fallit?

– Mítt bo› og helt bo›i› hjá mongum ø›rum vi› upp á ta› er at seta ein menningarprosess í gongd, hvar vit yvirtaka ávís politisk øki, sum vit eisini gjalda fyri. So mugu vit síggja, hvat vit kunnu gera uppá 15 ár og um vit til ta tí› eru før fyri at taka ta› stig, sum lei›slan í Tinganesi vil taka í dag. Hetta er torført at siga, tí ta› er tengt at, hvussu vit fara at klára okkum.

Birgir Danielsen er annars av teirri sannføring, at vit skulu ikki samrá›ast vi› danir um loysing ella fólkaræ›i. Ta› er naka›, sum vit taka og avgera sjálvi, tá tí›in er búgvin til tess. -Hetta er ikki naka›, sum vit skulu spyrja danir um, men kunnu vit samrá›a okkum fram til naka› skilagott, har vit hjálpa hvørjum ø›rum, so er ta› í lagi. Sjálvur ivast hann eisini stórliga í, um vit eru før fyri at skipa eina loysing innan fyri 4 ár, sum er ta› danska stjórnin vil bjó›a.

– Men hví er tú so sintur inn á Tjó›veldisflokkin?

– Ta› er tí, at hann hevur ongantí› riki› realistiskan politikk. Eg haldi ikki, at hann hevur fingi› nógv av skafti sí›ani stovnanina í 1946. Flokkurin hevur í alt ov stórum mun veri› ein sokalla›ur proklamatiónsflokkur, sum hevur mótmælt Nato ol.

Birgir Danielsen heldur annars, at stø›an í løtuni er so ørkymlandi. Vit vita als ikki, hvat vit vilja. Eina fólkaatkvø›u um hvat? Hann heldur annars ikki, at Nyrup hevur megna› uppgávu sína væl. Hann hevur veri› alt ov klossuttur. -Annars ivist eg ikki í, um danir vilja ikki hava at Føroyar loysa. Ta› vil Nyrup neyvan heldur. Og ta› er skeivt at halda, at Nyrup fer at bjarga okkum nakra loysing ella sjálvst‡ri. Ta› ver›ur ein alt ov pínlig stø›a hjá Nyrup. Hvat vi› Grønlandi, um føroyingar sleppa at taka loysing spyr Birgir Danielsen.

Skrædl í Fólkaflokkinum

SAMGONGA OG VAL
Jan Müller

– Tí›in er komin hartil, at Fólkaflokkurin rannsakar seg sjálvan og tekur upp til n‡ggja vi›ger› samarbei›i› vi› Tjó›veldisflokkin sigur Birgir Danielsen, fyrrv. løgtingsma›ur fyri Fólkaflokkin. Hann heldur ta› hev›i veri› best fyri Fólkaflokkin, um broytingar vór›u gjørdar í samgonguni solei›is at Fólkaflokkurin, Javna›arflokkurin og Sambandsflokkurin mynda›u ein grei›an meiriluta og fingu gjørt ein sáttmála vi› Danmark vi› td. broytingum í Heimast‡rislógini á sjálv-st‡rislei›, men heldur hann tó, at ta› ta› er ivasamt, um Anfinn Kallsberg torir at ganga vi› til ta›. -Men ver›ur hann ikki vi› uppá ta› nokk so skjótt, so fer tí›in at ganga undan, og tá ver›ur ta› ikki henda samgongan, sum fer at samrá›ast um komandi broytingar í vi›urskiftunum millum Føroyar og Danmark.

Birgir Danielsen heldur, at tí›in eisini er eisini vi› at ganga undan hjá Tjó›veldisflokkinum, sum bert hevur tann eina møguleikan og hann er nú.

Nú ta› nærkast landsfundinum hjá Fólkaflokkinum metir Birgir Danielsen, at samgonguspurningurin fer at ver›a frammaliga á skránni og har ikki minst leikluturin hjá løgmanni. Sjálvur vísir hann á, at Anfinn Kallsberg, løgma›ur er ein sera lagaligur ma›ur og hev›i hann veri› í gó›um selskapi, so hev›i hann eisini kunna› gjørt okkurt gott. -Men eg beri hann ótta fyri, at løgma›ur er í ringum selskapi, sum megnar at drega hann eftir nøsini. Og tí er stø›an sum hon er.

Hetta metir Birgir Danielsen fer at geva Fólkaflokkinum stórar trupulleikar til næsta væl.

– Flokkurin kann - heldur hann fram vi› verandi linju - lættliga missa einar tríggjar tingmenn. Ta› er ein veruleiki, at flokkurin hevur valt sær skeivan samstarvspartnara. Hann skuldi havt valt sær Javna›arflokkin og Sambandsflokkin til samstarvspartnara og lagt upp til eitt áramál uppá 10 til 20 ár í sambandi vi› ríkisrættarligu vi›urskiftini og kanska nátt nøkrum ítøkiligum úrslitum rættiliga skjótt. Harvi› fingu vit sett eina menningarprosess í gongd, sum endar vi›, at vit fingu ta› sjálvst‡ri, sum vit skulu hava sigur ein avgjørdur Birgir Danielsen, sum ikki roknar vi›, at samgongan heldur tí›ina út.

Listin er ikki or ›

og ta› gátuføra í málninginum er líka gátuført fyri listamannin, sum ta› er fyri ásko›aran, seg›i Bár›ur Jákupsson, tá Ingálvur av Reyni fekk handa› Mentunnarvir›isløn Landsins í Nor›urlandahúsinum mánakvøldi›

Ingálvur saman vi› konuni Elsu, tá i› hei›urslønin var› handa› honum mánakvøldi› í Nor›urlandahúsinum

MENTAN
Jústinus Leivsson Eidesgaard
Myndir: Jens Kr. Vang

Alt byrja›i fyri 30 árum sí›an, tá Ingálvur av Reyni fór undir at mála abstrakta list. Okkum dáma so væl at skipa alt innan fyri karmar og fyrsti veruligi abstrakti málningurin hjá Ingálvi av Reyni sá dagsins ljós í 1970 og sí›an tá hevur listama›urin flutt seg fram á n‡ggjum lei›um sum sló›brótari innan grálítirnar og sum ein av okkara rithøvundum tekur til: "Í gráum eru allir litir"

Tó ein listamann ber illa til at seta inn í ein tí›arkarm, tí ta› heila byrja›i, tá listama›urin fyrstu fer› fekk ein bl‡ant í hondina, ja enn tá fyrr, tá barni› hev›i okkurt evni undir hondum, sum kundi evnast til eina mynd. runu, sand, dust á gólvinum, ella døgg á rútinum, ja enntá margarini í margarinskálinu ella greytin, sum av óvart kom ni›ur á bor›i›.

Í 1970 var Ingálvur 49 ára gamal, hann hev›i drúgva listarliga útbúgving og hev›i mála› og tekna› eina ørgrynni á verkum. Hann var ikki nøgdur og fór at leita ví›ari. mánakvøldi› sat hann sum 79 ára gamal í Nor›urlandahúsinum og tók í móti størsta hei›urin Føroyar hava at bjó›a einum listarmanni og hann leitar framvegis. Kundi hent, at me›an hann sat og lurta›i eftir talunum, sum vóru hildnar honum til hei›urs, so reika›u tankarnir aftur til ólidna málningin, sum enn stendur vátur í atelierinum á Lützenstrø›. Ella øll hesi fólkini góvu honum n‡ggjan íblástur til n‡ggjar listarligar lei›ir, har máli› er ikki at koma á mál, men at nærkast teim ævigu vir›unum

Stórsligi› tiltak

Tiltaki› í Nor›urlandahúsinum var stórsligi› og tú sat eftir vi› kensluni, tá tiltaki› var enda›, at lívi› í løtum er deiligt at liva.

Bár›ur Jákupsson listama›ur helt rø›u fyri Ingálvi og hóast hann leg›i dent á, at málningalist er ikki or›, so so dugir Bár›ur væl í or›um at grei›a frá tí fjalda í málningum.

– Ta› kemur ikki Ingálvi til hugs at leggja seg afturá og njóta hei›urin fyri framd avrik. Hann kennir seg stø›ugt vera á lei›ini, stutt frá eini byrjan, ongantí› komnan á mál, seg›i Bár›ur Jákupsson.

– Halda vit hond yvir lut Ingálvs, kunnu vit spyrja: Hvussu he›vi okkara føroyska myndlist sæ› út, hvødu vit ikki havt ingálv av Reyni?

– Spurningurin kann ikki svarast beinlei›is. Men eg ivist onga løtu í, at myndin í síni heild hev›i veri› munandi ørvísi. Tí Ingálvur hevur øll hesi árini veri fyrimyndin, seg›i Bár›ur Jákupsson.

Torbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur í mentamálum, handa›i Ingálvi hei›urslønina

Vi› Gamaliens føtur

Landsst‡rsma›urin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen handa›i Ingálvi hei›urslønina, sum er upp á 150.000 krónur. Hann greiddi frá, at tá nevndin hev›i gjørt av, at Ingálvur skuldi hava Mentunnarhei›irsløn Landsins, so vildi hann ikki, at Ingálvur skuldi hava bo›ini at vita gjøgnum telefon. Hann vildi geva honum bo›ini sjálvur og Tórbjørn greiddi frá hvussu ta› kendist, tá hann sat inni hjá Ingálvi í heimi hansara á Lützenstrø›.

– Ta› kennist sum at sita vi› Gamaliels føtur. Hin stóri listamálarin av Ingutrø› er í totalari balansu, eisini tá i› landsst‡risma›urin sigur honum, at hann er ikki ørindaleysur hetta heystarkvøldi› Fyri føroysku tjó›ina og fólki› hevur hann valt at fylgja professionellu tilrá›ingini um at lata Ingálvi mentanarvir›isløn landsins fyri hetta ári›, seg›i Tórbjørn Jacobsen

– Valdi at bera tygum bo›ini á hendan hátt, fyri at tygum ikki skuldi gerast skelka›ur av bo›unum komu tey óvart á, ígjøgnum fjølmi›larnar." Ta› gongur ein lítil løta. Ma›urin, sum er komin til kempualdur, heldur um høvdi›. Og so letur í honum: "Eg eri skelka›ur, og helst eri eg ikki verdur nakra vi›urkenning." Fantastiskt at tosa vi› ein so lítillátnan mann, sum hevur lagt allan sín mátt í sín egna áhuga, í áhaldandi menning forfylgdi hann dreymunum, kosta hvat ta› kosta vildi. Eftir at hava práta› eina gó›a løtu um leyst og fast, letur knappliga úr honum: "Kanska skuldi eg heldur havt valt sangin sum yrkislei› í sínari tí›, men nú gerst so einki vi› ta›, ta› er so líti› eftiri av røddini, seg›i Tórbjørn Jacobsen.